# TILTØK

**MÁF**
(Meginfelag Áhugaleikara Føroya) heldur til í húsum Hans Andrias Djurhuusar undir Pisuvarða 2, Tórshavn
Tlf. 315624, Faks 315924,
e-mail: maf@maf.fo
Heimasíða: www.maf.fo
Opið er: má. og tý. kl. 10-15, mi. kl. 13-18, hó. og fr. kl. 10-15.
Endamál felagsins er at stuðla áhugaleiklist og menna hesa mentunargrein í Føroyum. 16 sjónleikarafeløg eru limir í MÁF.
Formaður: Hilmar Joensen, Nólsoy. Dagl. leiðari: Malan Matras Joensen.

**Lymfødemfelagið**
Box 2113, FO 165 Argir
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð. Samband fæst við felagið á tlf. 448454, Fía í Túni, ella tlf. 313424, Arnhild Johannesen.

**Parkinsonfelagið**
*MBF-húsið, Íslandsvegur 10C*
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband fæst við felagið hjá Tórhild,
e-mail:
torhildm@post.olivant.fo
Hildebjørg, tlf. 313897,
e-mail:
jwimport@post.olivant.fo
Nakað av bókum eru til láns hjá felagnum.

**Giktafelag Føroya**
Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
T-post: gikt@gikt.fo
www.gikt.com
Skrivstovan: Tlf. 31 02 37
Opið: týs- og hósdag
kl. 11.00-14.00.
**Fibromyalgibólkurin:** Opið mánadag kl. 11.00-13.00.
**Foreldraumboð:**
Nicolina Højgaard, heilsusystur tlf. 31 47 50
**Ungdómsumboð:** Sára Tummassardóttir tlf. 37 31 06.

**MBF – Meginfelag teirra brekaðu**
Skrivstovan er opin allar gerandisdagar millum kl. 09.00 og 16.00.
Íslandsvegur 10C, FO-100 Tórshavn.
Tlf. 317373. Fartlf. 264839.
Faks: 310813.
t-postur: mbf@post.olivant.fo
Heimasíða: www.mbf.fo

**Alzheimerfelagið**
Tórsbyrgi 16
100 Tórshavn
Heimasíða: www.alzheimer.fo
t-postur: sigmo@post.olivant.fo
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband fæst við felagið á tlf. 313102.
Demenslinjan er telefonráðgeving í øllum viðvíkjandi demens. Tlf. 313102 svarar týsdag kl. 18–20.

**Sinnisbati**
Íslandsvegur 10 C,
100 Tórshavn
tlf. 322544 · Fax 310813
T-postur:
sinnbati@post.olivant.fo
Skrivstovan er opin mikudag frá kl. 16.00-18.00. Fyrsta mikudag í mánaðinum er opið til kl. 19.30.
Tú ert vælkomin at ringja og spyrja um alt, sum hevur við sinnistrupulleikar at gera á tlf. 322544.

**Javni**
Skrivstovan er opin týsdag til fríggjadag kl. 10.00-14.00.
Adr.: Hoydalsvegur 40,
3. hædd.
Tlf. 314827 – fax 310557
Teldupostur:
javni@post.olivant.fo
Heimasíðan www. javni.fo

**Deyvafelag Føroya**
Skrivstovan er opin mánadag til hósdag frá kl. 10.00 til kl. 15.00. Tlf. 31.7597, fartlf. 22.2381, skrivitlf. 31.6929 fax 31.3609 og teldupostadr. deaf@post.olivant.fo
heimasíðan: www.deaf.fo

**Cøliakifelag Føroya**
Postadr.: MBF-húsið, Íslandsvegur 10C.
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst við at ringja til onkran av nevndarlimunum: Annegreta tlf. 448664
Beinta tlf. 310574
Henning tlf. 314783.

**Heilafelagið, MBF-húsið**
Íslandsvegur 10C
tlf./fax 321520
Telefontíð hvønn týsdag
kl. 18.00-20.00.

**Føroya Felag Móti Krabbameini**
*Grønlandsvegur 58, Tórshavn*
Telefontíð mánadag til fríggjadag frá kl. 13-15.
Tlf. 317959.
Teldupost: ffk@post.olivant.fo
www.ffk.fo

**Epileptikarafelag Føroya**
Postadr.: MBF-húsið, Íslandsvegur 10 C. Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst á tlf. 313978, Randfríð Sørensen, ella tlf. 319793, Mari Johannesen.

**Nýrafelagið**
Postsmoga 1063
110 Tórshavn.
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband fæst við felagið á e-mail:
thomsen1@post.olivant.fo
Tlf. 315928, Odny
Tlf. 315786, Karin Elisa
Tlf. 444796, Hallbjørg

**Felagið Føroyar-Kuba**
P. O. Box 2055, 165 Argir.
Tlf./fax 312098 · Teldupostur:
far_cuba@hotmail.com
Viðtala eftir avtalu.

**Føroya Astma/Allergifelag**
MBF-húsið, Íslandsvegur 10c,
Tlf./fax 311419.
Upplatingartíðirnar eru: hvønn hósdag kl. 16.30-18.00.

**Føroyingafelagið í Odense**
hevur opið hvørt fríggjakvøld frá kl. 20. Tú finnur okkum á Rugårdsvej 21 (kjallarin), 5000 Odense C.
Tlf.: 25395563
Teldupostur: ffo@post.gs
www.ffo.subnet.dk

**Føroyingafelagið í Esbjerg**
Danmarksgade 25,
6700 Esbjerg, tlf. 75132747
Opið hvørt mánakvøld kl. 19–22.00, har tú ert vælkomin at lesa bløðini, spæla kort og keypa tær ein kaffimunn.

**Føroyingafelagið við fjørðin**
Jægerspris. Vit hava ymisk tiltøk nakrar ferðir um árið. Kundi tú hugsað tær at vita meira um felagið, ella lokalt, so ring til Fríði tlf. 47317438
Gudni tlf. 47387748.

**Føroyskt felag í Ballerup**
Ryttergården, Pederstrup
2750 Ballerup

**Ráðgevingin fyri føroyingar í Danmark**
Vesterbrogade 17A
1620 København V
Tlf. 33239980
Fax: 33239234
Teldupostur:
fo.raadgivning@get2net.dk
Hjálp og vegleiðing í sosialum, persónligum og lestrarligum spurningum.

**Føroyingafelagið í Aalborg**
Lille kongens gade 10B,
tlf. 98 13 63 30
email: alaborg@alaborg.dk
Álaborg er opið soleiðis: Fríggjadag 17-19 og Leygarkvøld 23-03. Álakórið venur mikukvøld kl. 19.30
Annars verða tiltøk hjá felagnum lýst í Túnatos og á heimasíðuni www.alaborg.dk

**Føroyingafelagið Vesturskin, Bergen**
Vit skipa fyri tiltøkum nakrar ferðir um árið. Nærri upplýsingar við at venda sær til Elsebeth Reines, tlf. 55229049.

# HEILSANIR



Øllum tykkum, ið gleddu okkum á hjúnabandsdegnum 07.09.02 við gávum, telegrammum og vitjan, og tykkum, ið hjálptu so væl til, takka vit hjartaliga.
**Heilsan Hjørdis og Holgar Johannesen**



**Góða Katrin**
Hjartaliga tillukku við 13 ára føðingardegnum tann 21 febr. Eisini ein heilsan til Helen sum fylti tann 18.
**Heilsan vit í húsinum**



**Góða elskaði Benjamin**
Hjartaliga tillukku við 8 ára degnum 21. febr. Jesus pápi signi framtíð tína.
**Kærar heilsanir mamma, pabba og beiggi**



**Góði Bárður**
Hjartaliga tillukku við 5 ára degnum.
**Heilsan Sasho**

## Heilsanir

30,- kr. Sosialurin

**5 ferðir um vikuna**

### Gevið gætur

Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við 30,- kr. fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Argjavegi 26, millum kl. 8.00 og 16.00.

**Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á middegi 2 dagar fyri útkomudag.** Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.
❑ Týsd. ❑ Mikud. ❑ Hósd. ❑ Fríggjad. ❑Leygard.

Tekstur:..........................................................................
..........................................................................
..........................................................................
..........................................................................
..........................................................................
..........................................................................

**Myndina aftur:** Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og at leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði.
Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).
Navn: ..........................................................................
Bústaður: ......................................................................
Bygd/býur: .................................... Tlf.: ................

Sendið lepan, mynd og gjald til:
**Sosialurin**
Postsmoga 76 •110 Tórshavn
Merkið bjálvan: »**Heilsanir**«



## FILMSTEIGURIN

# Two Weeks Notice

## – Tvær vikur uppsagnartíð



Fleirmillióningurin Gerge Wade (Hugh Grant) hevur brúk fyri einum nýggjum sakførara. Saman við beiggjanum, Howard (David Haig) iegur hann Wade Corporation, sum er eitt av størstu íbúðarfeløgunum í New York. George er sjarmerandi andlit felagsins úteftir, men hann hevur keðiliga eginleikan altíð at seta í starv ungar, vakrar, kvinnuligar sakførarar, hvørs ytru fyrimuni vanliga eru nógv hægri enn professionellu evnini. Tað endar hvørja ferð við, at teir vøkru, ungu sakførararnir – umframt at hava verið í song við George – gera eitt stórt mistak, ið kostar felagnum eina rúgvu, og so er einki annað at gera, uttan at geva teimum sekkin.

Howard, sum er veruligi heilin aftan fyri felagið, krevur at enda, at George setur ein sakførara við pappírum frá øðrum enn brævaskeiðum – og allarhelst frá einum av teimum bestu lærdu háskúlunum. Annars missir hann øll síni partabrøv. Av tilvild hittir George Lucy Kelson (Sandra Bullock), ið livir upp til hesi strongu krøv. Hon hevur embætisprógv frá Harvard – enntá við útmerkilsi. Hon er idealistisk, við í fleiri grasrótarfeløgum og hevur vígt lív sítt til at bæsa feløgum, ið uttan fyrilit spilla umhvørvi. Lucy er tí á ongan hátt hugað at arbeiða fyri George og Wade Corporation. Í veruleikanum er hon í ferð við at forða felagnum at ríva niður ein gamlan íbúðarbygning til frama fyri nýggjum stásiligum eigaraíbúðum. Men tá George lovar Lucy, at hann fer at varðveita bygningin og enntá fer at seta hana at stjóra fyri vælgerðarfelagið hjá teimum, sigur hon – umenn treyðugt – »ja«.

Arbeiðið fyri George streingir tó skjótt Lucy, hon fær magasár og eitt eklatant svøvnloysi. Tað er ikki so nógv arbeiðið – sum George sjálvur – sum er trupulleikin. Hann er ábyrgdarleysur og sjálvupptikin, og tað sum verri er, fer hann ikki við henn sum við einum sjefadvokati, men sum sín persónliga hjálpara – sum klárar alt frá at fáa í lag hjúnaskilna hansara til at binda slipsaknútin fyri hann. Hon fær ikki eitt takkarorð, og at enda er tað nóg mikið fyri hana. Hon sigur upp – við 14 daga ávaring. George hevur tó uttan víðari ikki hugsað sær at latið hana farið. At enda letur hann hana tó fara – men við teirri treyt, at hon finnir sín egna avloysara. Og tað verður tann ambitiøsa, unga June (Alicia Witt), sum bæði hevur pappírini og útsjóndina í lagi. Hon er meira enn bara professiónell áhgua í George og setur ølls egl fyri at leggja hann niður.

Lucy er endiliga sloppin av við bæði George og Wade Corporation og kann taka uppaftur arbeiði sítt fyri tí, hon veruliga trýr uppá. Men okkurt vantar! Og við June í myndini er tað kanska longu ov seint hjá Lucy at fáa sagt George, hvat hon veruliga følir.

Ein romantisk komedia um kærleika við síðsta eygnabrá…







**Frumsýning**
Fríggjadagin 21.02. kl. $19^{00}$
Fríggjadagin 21.02. kl. $23^{30}$
Leygardagin 22.02. kl. $21^{15}$
Sunnudagin 23.02. kl. $20^{00}$
Fríggjadagin 21.02. kl. $21^{15}$
Leygardagin 22.02. kl. $19^{00}$
Leygardagin 22.02. kl. $23^{30}$
Sunnudagin 23.02. kl. $22^{15}$

**Stórt úrval av DVD-filmum til sølu**

**HAVNAR BIO**
P Tlf. 31 19 56 P
www.bio.fo




**Billettprísur: 45,- kr.**
Fríggjadagin 21.02. kl. $17^{00}$
Leygardagin 22.02. kl. $17^{00}$
Sunnudagin 23.02. kl. $18^{00}$




Fríggjadagin 21.02. kl. $20^{30}$
Leygardagin 22.02. kl. $20^{30}$
Sunnudagin 23.02. kl. $21^{45}$
Fríggjadagin 21.02. kl. $23^{00}$
Leygardagin 22.02. kl. $23^{00}$




Fríggjadagin 21.02. kl. $18^{15}$
Sunnudagin 23.02. kl. $19^{30}$
Leygardagin 22.02. kl. $18^{15}$

**KOMANDI FILMUR**




**Frumsýning Fríggjadagin 28.02.**